# Hvussu fáa vit ferðafólk at surfa til Føroya?

**Ferðaráð Føroya bjóðar til evnisdag á Hotel Føroyum 8. apríl um marknaðar-føring á internetinum - við serligum atliti at ferðavinnuni**

TÍÐINDASKRIV

Internetið hevur kollvelt alla marknaðarføring - og ikki minst innan ferðavinnu. Nýggj flogfeløg hava vunnið kappingina um marknaðin, gomul eru farin á heysin. Fólk leita til nýggj ferðamál, og venda gomlum bakið. Alt samalt, tí internetið er komið, og tí nøkur duga væl at brúka tað, meðan onnur duga illa.

Hvussu brynja vit okkum á besta hátt til hesa nýggju avbjóðingina? Henda spurning setir Ferðaráð Føroya á evnisdegnum tann 8. apríl.

### Fimm fyrilestrar

Til tess at fáa evnið lýst úr fleiri sjónarhornum, hevur Ferðaráðið fingið fimm fólk, sum hava royndir á hvør sínum øki, at leggja fram.

Jónsvein Joensen, KT-ráðgevi á teldufyritøkuni Kervi, fer at tosa um síðbundna mótvegis nýskapandi marknaðarføring á internetinum og spyr, hvussu føroyska ferðavinnan kann gagnnýta netið á besta hátt.

Jacob Hancke, ið er ráðgevi í donsku fyritøkuni SignalDigital, fer at tosa um, hvussu ein heimasíða skal vera bygd upp og skipað til tess at gera mest gagn. Hann kemur eisini inn á vandan fyri, at ein vánalig heimasíða rætt og slætt kann styggja kundar.

Walter Jensen, ráðgevi innan ferðavinnu, fer at tosa um, hvussu ein best sameinir tann prentaða faldaran og teir møguleikar, ið internetið gevur.

Høgni Rasmussen, stjóri í lýsingarstovuni Sansir, fer at greiða frá, hvussu ein marknaðarførir sjálva heimasíðuna.

At enda fer stjórin í Gallup Føroyar, Ellintur Egilstrøð, at greiða frá um nýggja vevteljaran hjá fyritøkuni.

### Tilmelding

Evnisdagurin byrjar kl. 9.30 og endar umleið kl. 16.00. Bæði fyrra og seinnapart verður drekkamuður, og á middegi verður kalt borð, sum er íroknað prísin

Tilmeldingin fer fram á heimasíðuni hjá Ferðaráðið Føroya: www.tourist.fo.

Seinasta freist at melda seg til er 1. apríl.

## Grækarismessu-hald í Vági

Sum vanligt á hvørjum ári, so skipar skótaliðið í Vági fyri grækarismessuhaldi 12. mars. Haldið verður við minnisvarðan klokkan 15.

Skótarnir fara til gongu úr skótahúsinum hálvan tíma undan haldinum.

Varaskúlastjórin og fyrrverandi landsstýrismaðurin Óli Holm heldur grækarismessurøðuna í ár. Kórið Ljómur tekur lut við sangi, sum vanligt er.

Aftaná bjóða skótarnir kaffi í Framtíðini. Um ikki viðrar, so verður grækarismessuhaldið inni í Framtíðini.

-do-

Internet Sosialur in
www.sosialurin.fo

# Yvirlýsing frá Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktar-frøðingar

Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar mótmælir harliga ætlanini hjá leiðsluni á Landssjúkrahúsinum, at siga 8 sjúkrarøktarfrøðingum á føðideildini úr starvi, samstundis sum annar starvsbólkur verður settur inn á deildina í staðin.

At hetta skal kunna brúkast sum ein liður í sparing og menning, meta vit, sum ein beinleiðis reingjan av sannleikanum.

Vit meta, at ætlanin hjá leiðsluni hevur ikki sjúklingin í fokus og at avleiðingarnar verða, at sjúklingar, barnið, familjan og serliga kvinnan aftur verða fyri vanbýti. Við uppskotinum, meta vit ikki, at trygdin hjá sjúka pinkubarninum verður sett í hásæti

Føðideildin á Landssjúkrahúsinum kann ikki samanberast við føðideildir í Danmark. Føðideildin er ein blandað deild, ikki bert ein føðigongd, men eisini ein sjúkradeild við neonatalari deild. Afturat vanligum barnsburðum tekur hon sær av ov tíðliga føddum (præmaturum) børnum, børnum við breki og sjúku annars.

Hesi kunnu væntast at verða verri fyri, tá tey serkønu á økinum fara at mangla á deildini og kvaliteturin í røktini gerst verri enn í dag. Starvsbólkurin, sum eftir ætlanini skal avloysa sjúkrarøktarfrøðingarnar, er ikki skúlaður til hesar uppgávur.

Á neonatalum deildum í Danmark starvast bert læknar og sjúkrarøktarfrøðingar.

A 3, songardeildin fyri kvinnusjúkur, er júst afturlatin mestsum frá degi til annan og tekur føðideildin sær tí, umframt av teim frísku barnakonunum, eisini av sjúkum barnakonum, ið allar hava krav uppá kvalifiseraða sjúkrarøkt.

Í hesum sambandi er ætlanin eisini at minka talið av songarplássum á føðideildini og koma tí fleiri kvinnur at eiga ambulant. Her skal gerast vart við, at Heilsufrøðiskipanin ikki er fyrireika til hesa uppgávuna. Sum er, eru enn øki í landinum, ið ikki hava heilsufrøðing.

Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar mótmælir harliga ætlaðu broytingunum á Føðideildini og meinar, at tær eru óneyðugar á eini vælvirkandi deild við vælútbúnum og dugnaligum sjúkrarøktarfrøðingum, ið hava førleika at útinna allar kravdu sjúkrarøktaruppgávurnar.

*10. mars 2005*

**Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar**

SPEKT statsaut. revisorar

Correspondent Firm of KPMG International a Swiss Cooperation

Starvslýsing

## Stjóri til Búnaðargrunnin

Fyri Búnaðargrunnin verður søkt eftir stjóra.

**Um Búnaðargrunnin**
Búnaðargrunnurin varð stovnaður tann 1. januar 2005 og yvirtók í hesum sambandi ognir og virksemi hjá Jarðargrunninum og Grunninum fyri Vakstrarhús og Grønmetisframleiðslu. Virksemið hjá Búnaðargrunninum fevnir um útlán til landbúnað.

Búnaðargrunnurin verður umsitin av einum av landsstýrismanninum valdum stýri við 5 limum.

Í grunninum eru 4 starvsfólk.

**Starvið**
Talan er um eitt nýtt starv. Stjórin fær ábyrgdina av dagligu leiðsluni av Búnaðargrunninum við ávísing til stýrið.

Stjórin skal í neyvum samarbeiði við stýrið í Búnaðargrunninum, skipa fyri innanhýsis mannagongdum í sambandi við veitan av lánum og røkt av núverandi lánum.

Starvið er sambært lógini um Búnaðargrunnin tíðaravmarkað til 1. mai 2007.

Lønin verður ásett eftir nærri avtalu.

**Umsøkjarin**
Dentur verður lagdur á, at umsøkjarin:

- hevur leiðsluroyndir
- hevur hollan ástøðiligan og praktiskan kunnleika til roknskap og fíggjarviðurskifti, umframt at verða vanur at arbeiði við teldu
- dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- hevur góð samstarvsevni
- dugir væl at málbera seg í skrift og talu.

**Umsóknir**
Umsókn við upplýsingum um útbúgving og royndir, skal sendast til SPEKT statsaut. revisorar Sp/f, í seinasta lagi 1. apríl 2005.

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Súna Schwartz Jacobsen á telefon 34 34 34.

Allar upplýsingar og umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Spekt statsaut. revisorar Sp/f
spekt@spekt.fo
www.spekt.fo

Staravegur 1
Postboks 3258
FO-110 Tórshavn
Telefon 34 34 34
Telefaks 34 34 35

Heiðavegur 15
Postboks 190
FO-600 Saltangará
Telefon 474 474
Telefaks 474 475

TEAM85